# Klaksvíkingar á meistarakós

**Eftir sætta umfar eru klaksvíkingar tvey stig fremri enn havnarmenn, og úr Klaksvík frættist nú at bert fyrsta pláss er nøktandi fyri sigursvanda felagið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Fyri einum ári síðani vóru klaksvíkingar í somu støðu, nevnliga tryggir á fyrsta plássi í 1. deild eftir seks umførum. Eftir lokna kappingvar støðan heldur broytt, tí klaksvíkingar fingu loksins eitt skuffandi triðja pláss og trý stig væntaðu upp til føroyameistarnir úr Havn.

Munurin í ár er, at Ólavur Simonsen telvar aftur við barndómsfelagnum, og styrkir hetta væl um alt liðið. Nógv skal ganga galið um klaksvíkingar ikki megna at endurvinna FM-heitið frá 1999.

Í vikuskiftinum vóru hvalvíkingar á vitjan í Klaksvík, og oftani hava teir nógv stig við heimaftur. Men hesaferð bar einki til. 4-0 til oddaliðið úr Klaksvík, sum viðførir tryggu leiðsluna nú fýra umfør resta í.

Ólavur Simonsen vann eitt gott álopstalv í eyðkendum stíli ímóti Martin Brekká, og somuleiðis vann Rani Nolsøe eitt vælleikt talv við hvíta fólkinum ímóti Finnbjørn Zachariassen.

Hinvegin var talvið millum Steintór Rasmussen og Sámal Christiansen heldur óklárt at byrja við, men sum krút úr tunni fekk Steintór mátálop sum avgjørdi talvið. Fjórði maðurin á klaksvíksliðnum, Tummas Martin Anthoniussen, hevur havt - eins og Steintór — eitt gott kappingarár. Eisini sunnudagin eydnaðist tað Tummas Martini at vinna, hesaferð við hvíta fólkinum ímóti Bergur Magnussen. Men tað varð ikki fyrrenn tíðaneyðin herjaði á báðar partar, har avgerðin fall í lut til klaksvíkingin.

4-0 og kósin er sett, meðan hvalvíkingar hinvegin helst muga taka til takkar við einum miðplássi tá avtornað verður.

### HT2 steðgar HT1

Í Havnini var lokaluppgerð millum HT og HT 2. Hjá besta liðnum var kravið stórsigur um fylgjast skal við oddaliðnum úr Klaksvík. Ikki varð hetta besti dagur hjá føroyameistaranum seinastu tvey árini, tí einans hálvtriðja stig fingu teir frá felagsvinunum. Manningin á næstbesta liðnum úr Havnini skulu tó hava heiður fyri at stríðast tað teir megna, og higartil hevur gingið betur enn væntað var, sjálvt um teir liggja aftastir.

HT 1 var skert, eftirsum Martin Poulsen ikki var tøkur. Olaf Berg hevði tí ábyrgdina á fyrsta borði og vann hann eitt drúgvt talv ímóti Óla Joensen. Olaf hevði mann fyri tvær finnur, sum akkurát varð nóg mikið. Herluf Hansen hevur telvað væl í ár, og vann hann eitt trygt talv á Johan E. Hansen á øðrum borði.

Andrias Ziska og Jógvan Næs tóku ein skjótan javnleik, har Jógvan tó hevði finnu meir í rókaendatalvi. Jógvan hevur vunnið fýra talv og leikt tveir javnleikir og hevur vunnið sær óvanliga nógva rating.

Jóhan Gaard leikti á fyrsta sinni á fremsta havnarliðnum, á fjórða borði. Mótstøðumaðurin var formaðurin í Havnar Telvingarfelag Jóannes Guttesen, sum óvæntað vann á Jóhan. Í rúkandi tíðarneyð mátaði Jóannes Jóhan.

### Javnt ímóti Rødgaard

Í Vestmanna fingu vestmenningar trý góð stig frá kollfirðingum. Enn einaferð gjørdi Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði vart við seg, tá hann fekk javnt ímóti IM John Rødgaard. Í fjør vann hann á Rødgaard.

Torbjørn Thomsen vann á fyrrverandi felagstelvaranum úr Kollafirði, Eyðálvur Johannesen á øðrum borði. John Jacobsen vann á Karl Louis Johansen, meðan Kári Duhuus og Alvin Joensen leiktu javnt.

3-1 er sjálvsagt ein góður sigur, men tá hugsað verður um úrslitið í Klaksvík, var tað ein ov lítil sigur.

### Støðan eftir 6. umfar

| | |
|---|---|
| KTF | 16,5 |
| HT | 14,5 |
| VT | 14,0 |
| KT | 10,5 |
| TFS | 9,0 |
| HT2 | 7,5 |

Sjeynda umfar verður 27. Januar, og vera tá hesir dystir leiktir: HT2 — KTF, TFS — VT og HT — KT.

### Dreymurin brast

Eftir ósigur í fjórða umfari hava føroysku talvútisetarnir helst mist møguleikan at leika seg upp í 1. deild í Danmark. Tað byrjaði annars væl hjá føroyska felagnum, men nú tykist møguleikin veruleikafjarur, tí heili fimm stig eru upp til fremsta liðið.

Sunnudagin æt mótstøðuliðið Skakspilleren, og tá rating viðvíkur vóru liðini bæði nøkunlunda jøvn. Úrslitið 5-3 til danska liðið, prógvaði tó tíverri nakað heilt annað.

Einasti ið megnaði at vinna á føroyska liðnum, varð Rógvi W. Rasmussen. Heini Olsen, Eyðun Nolsøe, Hlidar Hreinsson og Carl Eli N. Samuelsen leiktu javnt, meðan John Arni Nilssen, Flóvin Tór Næs og Heini Danielsen taptu.

Tvey lið flyta niður í triðju deild, og heldur máa føroyingarnir nú venda eyguni tann vegin og royna at stríðast undan niðurflyting. Tað málið er meira realistiskt enn tankin um uppflyting nú trý umfør resta í. Næsti dystur verður 3. februar, tá føroyingar hitta Hillerød.

### Støðan:

| | |
|---|---|
| K41 | 21 |
| Helsingør | 17,5 |
| Skakspilleren | 16,5 |
| AS 1904 | 16 |
| Føroyar | 16 |
| Hillerød | 15,5 |
| Lyngby | 13 |
| Fredriksberg | 12,5 |

## Talvið hesa vikuna

**Rógvi W. Rasmussen — Stig Hansen**
**2. div. DK**

1.d4 Rif6 2.c4 c5 3.Rif3 cxd4 4.Rixd4 e5 5.Rib5 d5 (svartur offrar finnu fyri fríari spæl) 6.cxd5 Bc5 [6...Rixd5?? 7.Fxd5 Fxd5 8.Ric7+] 7.e3 0-0 8.Ri5c3 Re8 9.Be2 e4 (besti leikur, sum kroystir hvítu støðuna eitt petti meir) 10.a3 Bf5 11.b4 Bd6 12.Ra2 (rókurin kemur í spæl) a6 13.Rd2 Ribd7? 14.g4! (hvítur vinnur mann. Leikar hann t.d Bg6, kemur g5 og riddarin hevur ongar puntar) 14...Rixg4 15.Bxg4 Fg5 16.Bxf5 Fxf5 (svartur telvar síir bestu møuleikar, og hvitur skal ansa sær) 17.Rie2 Rie5 18.Rid4 Fh3 19.Fe2 Rac8 20.Kd1 Fg2 21.Ff1 Fg4+ 22.Fe2 Fg2 23.Rf1 Rig4 24.Rif5 Bxh2 25.Bb2 g6 26.d6! Rcd8 27.Rie7+ Kf8 28.Rid5? [28.Ric8 varðveitur avgerandi fyrimunin. Nú útjavnar svartur] 28...Rxd6 29.Kc1 Rxd5! 30.Rxd5



Rixe3! (útjavnandi leikurin) 31.Fxe3 Fxf1+ 32.Kc2 Fc4+ 33.Ric3 Be5 (hvítur hevur mist fyrimunin, og bert við røttum spælið kann hvítur bjarga javnleikin) 34.Rc5 Fd4 35.Rid1 Fd6?? (tapandi leikur! Fxe3 og hareftir má hvítur stríðast fyri javnleikin í endatalvinum) 36.Fh6+! (einfaldur vinnandi leikur) 36...Kg8 37.Bxe5 Fd3+ [37...Rxe5 38.Rc8+] 38.Kc1 og einki er at gera. svartur gavst 1-0

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 1 | 1 -0 - 0 | 381 | 232 | 149 | 14 |
| 2 | Stjørnan | 2 | 2 -0 - 0 | 380 | 293 | 87 | 13 |
| 3 | Neistin | 2 | 1 -1 - 0 | 305 | 261 | 44 | 11 |
| 4 | VB | 2 | 1 -1 - 0 | 323 | 335 | -12 | 9 |
| 5 | Kyndil | 2 | 0 -0 - 2 | 311 | 365 | -54 | 3 |
| 6 | Sóljan | 2 | 0 -0 - 2 | 250 | 385 | -135 | 2 |
| 7 | StÍF | 1 | 0 -0 - 1 | 223 | 302 | -79 | 1 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 2 -0 - 0 | 408 | 339 | 69 | 15 |
| 2 | Neistin | 2 | 2 -0 - 0 | 442 | 363 | 79 | 14 |
| 3 | StÍF | 1 | 1 -0 - 0 | 363 | 346 | 17 | 8 |
| 4 | H71 | 2 | 0 -0 - 2 | 384 | 409 | -25 | 6 |
| 5 | KÍF | 2 | 0 -0 - 2 | 369 | 411 | -42 | 4 |
| 6 | Tjaldur | 1 | 0 -0 - 1 | 315 | 360 | -45 | 4 |
| 7 | Kyndil | 2 | 1 -0 - 1 | 320 | 373 | -53 | 4 |

## Máltindarnir

**Kvinnr:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 125 | (36) |
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 120 | (17) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 102 | (45) |
| Gabriella Fekete | VB | 96 | (22) |
| Ioana Rápa | VÍF | 90 | (23) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 77 | (2) |
| Regina Radó | VB | 72 | (18) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 66 | (10) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 66 | (34) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 62 | (13) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 60 | (1) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 60 | (6) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 58 | (10) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 56 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 54 | (4) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 96 | (22) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 95 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 89 | (26) |
| Heini Joensen | Neistin | 86 | (25) |
| Høgni Klein | Kyndil | 85 | (6) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 80 | (10) |
| Finnur Hansson | H71 | 76 | (20) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 75 | |
| Durica Tomic | KÍF | 75 | (20) |
| Ingi Olsen | VÍF | 74 | (8) |
| Iljan Topic | KÍF | 72 | |
| Sámal Joensen | VÍF | 72 | (13) |
| Áki Olsen | VÍF | 70 | (10) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 65 | (6) |
| John Petersen | Neistin | 64 | (1) |



Búskapur og vinna

## Truplar skattareglur

Bæði grannskoðarar og fólk í donsku skattaumsitingini mótmæla nú teimum nógvu og mangan torskildu reglunum á skattaøkinum.

Tey vísa á, at á hvørjum ári fáa skattamyndugleikarnir millum 40 og 50 nýggjar skattalógir at arbeiða eftir, og afturat teimum koma so einar 5.000 vegleiðingar av ymsum slagi. Hetta eru dómar og niðurstøður av ymsum slagi, sum skulu avgera tulkingarspurningar.

Felagið hjá teimum skrásettu grannskoðarunum í Danmark sigur, at hvøki skattamyndugleikarnir ella grannskoðararnir hava nakran møguleika at seta seg inn í allar reglurnar. Teir skrásettu grannskoðararnir vilja eisini vera við, at tær nógvu lógirnar og reglurnar gera tað fullkomiliga ógjørligt hjá vanliga skattgjaldaranum at tryggja sær, at hann rindar tann skatt, hann ella hon eigur at rinda.

Í skattamálaráðnum siga tey, at tey gera ikki annað enn tær lógir og reglur, sum eru neyðugar.

## Gjalda við korti

Nógv teir flestu norðmenninir rinda nú við korti heldur enn kontantum pengum. Fyri trimum árum síðani nýttu norðmenn líka ofta kort sum kontantar pengar, tá teir keyptu ella skuldu rinda okkurt, men ein nýggj kanning vísir, at nú nýta 62 prosent av norðmonnum kort. Bara 32 prosent siga, at tey framvegis heldur vilja hava pengar enn kort uppi á sær.

Kanningin vísir eisini, at tað eru serliga tey ímillum 30 og 44 ár, sum nýta kort, men tað er eisini týðiligt, at alt fleiri eldri norðmenn eru farnir yvir til at nýta kort tey seinastu árini.

Norsku peningastovnarnir siga, at í fjør rindaðu fólk í Noregi næstan 180 milliardir norskar krónur við korti. Tað var heili 15 prosent meiri enn árið fyri.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Cyrus Vance deyður



*Cyrus Vance átti ein stóran lut í friðarsáttmálanum millum Ísrael og Egyptaland.*

**Fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin doyði leygardagin 84 ára gamal.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Cyrus Vance var uttanríkisráðharri í demokratisku stjórnini hjá Jimmy Carter, forseta í árunum frá 1977 til 1980.

Cyrus Vance var sera virkin í royndunum at fáa varandi frið í Miðeystri, og hann var ein av høvuðsmonnunum aftan fyri tær sonevndu Camp David-samráðingarnar, sum endaðu við einari friðaravtalu millum Ísrael og Egyptaland.

Vance hevði eisini ein lut í SALT- samráðingunum millum USA og gamla Sovjetsamveldið um at avmarka kjarnorkuvápnini hjá teimum báðum stórveldunum, eins og hann átti ein týðandi lut á sáttmálanum um Panama-veitina.

Cyrus Vance tók seg burtur úr stjórnini hjá Carter eftir ta miseydnaðu royndina hjá forsetanum at fría amerikansku gíðslarnar á amerikansku sendistovuni í iranska høvuðsstaðnum Teheran í 1980.

Fyrrverandi uttanríkisráðharrin leið av Alzheimers-sjúkuni, og hann doyði á einum sjúkrahúsið í New York leygarmorgunin.

# Ein nýggj El-Nino á veg

**Amerikanskir granskarar siga, at ógvusliga veðurhugtakið El Nino fer aftur at gera um seg á syðru jarðarhálvu.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

El Nino ella Jesusbarnið er tað ógvusligasta veðurhugtakið, sum hevur gjørt um seg seinastu árini. Tað stendst av, at ójavni er í veðurlagnum í Kyrrahavinum, og tí at sjógvurin á hesum leiðum verður heitari, enn hann vanliga er.

Granskarar á amerikanska stovninum The National Oceanic Atmospheric Administration siga, at ein nýggj El Nino er á veg, men at tað enn er ov tíðliga at siga, hvussu ógvusligar avleiðingarnar verða hesaferð.

Seinast El Nino gjørdi um seg var í 1997 og 1998. Ta ferðina elvdi hon til bæði turk og vatnflóð í Mið- og Suðuramerika, syðra parti av Afrika og í Kyrrahavinum, og fleiri túsund fólk lótu lív.

Granskarin Vernon Kousky sigur við bretska blaðið The Guardian, at enn duga teir ikki at siga, um tann komandi El Nino verður líka ógvuslig sum tann seinasta.

Amerikansku granskararnir siga seg vera rættiliga vísar í, at tann veksandi hitin á Jørðini fer at hava við sær, at El Nino fer at gera oftari um seg enn fyrr, og avleiðingarnar eisini verða størri.

Higartil hevur El Nino gjørt um seg umleið tíggjunda hvørt ár og kann vara upp í eitt ár. Avleiðingin hevur verið turkur í umráðum, sum vanliga hava nógv avfall so sum Indonesia og Avstralia, meðan oyðimarkarlendi í Afrika og Suðuramerika fáa vatnflóð.

# Eysturríki hjálpir Mugabe

**Harðrenda stýrið í Zimbabwe fær hernaðarútgerð úr Eysturríki.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Tann illa lýddi forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, hevur verið fyri hvøssum atfinningum seinastu tíðina, eftir at hann hevur roynt at fáa í gildi lógir, sum skulu gera tað ómøguligt hjá andstøðuni at taka lut í forsetavalinum í næsta mánað. Eisini er komið fram, at viðhaldsfólk hjá forsetanum hava gjørt seg inn á andstøðupolitikarar og skrivstovur hjá andstøðuflokkinum MDC.

Viðurskiftini hava havt við sær, at Bretland hevur sett sínum hernaðarvirkjum forboð fyri at selja Zimbabwe vápn ella aðra herútgerð. Tað hevur ES ikki gjørt, men ES hevur tó lýst støðuna í landinum sera vandamikla.

Tað hevur eftir øllum at døma ikki forðað hernaðarvirkjum í Eysturríki at selja Zimbabwe herútgerð. Eysturríkska blaðið Format skrivaði í gjár, at fyritøkan Steyr Specialfahrzeuge hevur selt Zimbabwe fleiri hernaðarakfør. Sambært blaðnum hava zimbabwisku myndugleikarnir bílagt akførini til eina servanda herdeild, sum skal skipast í sambandi við forsetavalið í mars.

Úr norðurlondum

## Færri morð

Samanborið við fólkatalið hevur talið á morðum í Grønlandi verið ógvuliga stórt í mong ár, men sambært blaðnum Sermitsiak var talið minni í fjør enn tey seinastu árini.

Blaðið skrivar, at sjey fólk vórðu myrd í Grønlandi í fjør, fýra menn og tríggjar kvinnur. Seinastu tíggju árini hevur talið verið uppi á 21 eitt árið, eitt annað ár var tað 15 og eitt triðja ár 12. Trý ár var talið kortini niðan fyri sjey.

Samstundis hevur rætturin í Nuuk hert revsingina fyri harðskap og morð. Fyrr var vanligt, at fólk vórðu dømd fimm ár á stovn, men nú er rættiliga vanligt, at revsingin er sjey ár, skrivar Sermitsiak.

## Ring luft í Oslo

Luftin nógvastaðni í Oslo er so ring, at myndugleikarnir verða noyddir at taka munagóð stig, skal norski høvuðsstaðurin lúka tær reglur, sum ES hevur sett sínum stórbýum.

Um hálvan desember vísti ein máting, at sera nógv nitrogendioksid var í luftini á ávísum støðum í Oslo. Mátingin hjá heilsumyndugleikunum vísti meira enn 400 mikrogram av nitrogendioksid fyri hvønn rúmmetur av luft, og hetta er tað mesta, sum nakrantíð er mátað í býnum, síðani myndugleikarnir fóru undir slíkar kanningar.

Heilsumyndugleikarnir siga, at nógvastaðni í býnum er tað tann nógva ferðslan, sum dálkar luftina. Í sjálvum miðbýnum er tað ein trupulleiki, at fólk har nýta við til brenni.

## Ov stutt

Danska stjórnin og Framburðsflokkurin eru ósamd um avgerðina at taka av nevndir og ráð. Framburðsflokkurin sigur, at avgerðin røkkur ov stutt. Flokkurin krevur, at stjórnin skal strika fleiri ráð á innflytaraøkinum, men Bertil Haarder, ráðharri í innflytaramálum sigur nei. Hvat ósemjan kann elva til, er ikki greitt enn.